# Heimligur pallur við útlendskum oyrum

**- Tað er trupult hjá einum einstøkum bólki at fara til London og fáa røttu fólkini at lurta eftir sær. Her koma fólk úr útlandinum til Føroya at lurta eftir tónleiki, og tann møguleikan skulu bólkarnir royna at fáa nakað burturúr, sigur Fróði Vestergaard, samskipari av Atlantic Music Event**

AME
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Tað vóru dagar, tá ið Prix Føroyar tónleikakappingin var ein stórhending í føroyskum tónleiki. Bólkar í hópatali komu út úr kjallarum og av loftum við nýggjum føroyskum tónleiki, sum varð spældur fyri eini stórari fjøld av føroyingum. Spenningurin var stórur, kjakið nógv, og endin sum oftast góður.

Men tað, sum byrjaði sum Prix Føroyar, er nú endað við Atlantic Music Event, sum á ein annan hátt skal fáa føroyskan og annan norðurlendskan tónleik fram.

Prix Føroyar kappingin er fyribils farin í søguna – seinasta kappingin var fyri tveimum árum síðani – og nú er avloysarin klárur í nýggjum hami. Talan er um AME, sum í ár verður við aðrari norðurlendskari luttøku, enn bert teirri føroysku.

- Atlantic Music Event er ein showcase við góðum tónleiki, góðum ljóði og góðum ljósi. Hetta eru konsertir, sum skulu fáa norðurlendskan tónleik meira fram og vónandi eisini kasta nakað av sær í fløgusølu og framførslum, sigur Fróði Vestergaard, sum er samskipari av AME, ið verður hildið um vikuskiftið.

## Góður møguleiki at vísa seg

Konsertir við kendum føroyskum bólkum og útlendskum bólkum verða í Havn – fyrst og fremst í Norðurlandahúsinum – og nógv fólk innan tónleikalívið í Føroyum og uttanlands verða til staðar at lurta, meta um og kanska eisini gera avtalur við bólkar, tá ið alt kemur til alt.

- Ein partur av konsertini er, at vit vilja vísa nakrar góðar føroykar bólkar fram fyri útlendsku gestunum. Samstundis hava vit eisini fingið nakrar aðrar norðurlendskar bólkar, sum føroyingar kanska ikki kenna so væl enn, at spæla. Hugskotið er so, at fólk finna saman, tosa saman, og vónandi kann eisini okkurt spennandi spyrjast burturúr, sigur Fróði Vestergaard.

Nógvir norðurlendskir gestir koma til tiltakið, og eisini aðrir útlendingar hava oyruni og eyguni við sær til Føroya. Umboð fyri útlendskar festivalar, spælistøð, tíðarrit og aðra tónleikavinnu verða í Havn um vikuskiftið.

- Hetta er ein sera góður møguleiki hjá føroyskum og øðrum norðurlendskum tónleikarum at vísa seg fram fyri fólki, sum skipa fyri konsertum og festivalum. Tað er trupult hjá einum einstøkum bólki at fara til London og fáa røttu fólkini at lurta eftir sær. Her koma fólk úr útlandinum til Føroya at lurta eftir tónleiki, og tann møguleikan skulu bólkarnir royna at fáa nakað burturúr, sigur Fróði Vestergaard.

## Eingin kapping og ongar virðislønir

Tað plagdi at verða gjørt sera nógv burtur úr Prix Føroyar tónleikakappingini, tá ið hon varð hildin. Kappingin skapti stóran spenning og nógva umrøðu, og loftmiðlarnir sendu nógv frá kappingini. Hesaferð er eingin kapping at slóða fyri áhuganum, og hvørki útvarp ella sjónvarp fara at senda beinleiðis frá AME um vikuskiftið.

- Á eini hátt er kappingin altíð til staðar í tónleikinum, tí fólk meta jú um framførslurnar hjá teimum ymsu bólkunum, og tosað verður um, hvør kláraði seg væl. Kappingin var festlig og spennandi, men hesaferð hava vit so nógvan góðan tónleik á pallinum, at tað í sær sjálvum skuldi verið áhugavert fyri nógv fólk.

- Ein fyrimunur við, at loftmiðlarnir ikki senda frá konsertunum er, at nú kunnu ljóð- og ljósumstøðurnar gerast uttan fyrilit fyri loftmiðlunum. Tað vil siga, at nú verður talan um eitt live-upplivilsi við nógvum góðum tónleiki. Tað verður meira frítt og minni stýrt, sigur Fróði Vestergaard.

Tá ið AME varð hildið fyri tveimum árum síðani, vóru virðislønir lætnar til føroyskan tónleik, men soleiðis verður ikki hesaferð.

- Nú lata onnur virðislønir til føroyskan tónleik, og tí halda vit ikki, at tað er nøkur grund, at AME kemur umaftur her í apríl mánaði og heiðrar føroyskan tónleik. Tað kemur bara inflatión í hetta, og tí vilja vit lata onnur um at lata heiðurslønir, sigur Fróði Vestergaard.



*- Á eini hátt er kappingin altíð til staðar í tónleikinum, tí fólk meta jú um framførslurnar hjá teimum ymsu bólkunum, og tosað verður um, hvør kláraði seg væl. Kappingin var festlig og spennandi, men hesaferð hava vit so nógvan góðan tónleik á pallinum, at tað í sær sjálvum skuldi verið áhugavert fyri nógv fólk, sigur Fróði Vestergaard um nýggja AME-tiltakið*